# Skal tryggja samráðingarandan

*Fólkatingsnevndin, ið skal fylgja ríkisrættarligu samráðingunum, fór í gjár til verka. Í nevndini eru 21 limir og Peter Duetoft úr Centrum-Demokratunum er formaður*



*Peter Duetoft frá Centrum Demokratunum er formaður í fólkatingsnevndini, ið skal ráðgeva donsku stjórnini undir rískisrættarligu samráðingunum við føroyingar*

**Mynd: Føroyska Tíðindastovan**

JOHN JOHANNESSEN

Fólkatingsevndin, ið skal fylgja ríkisrættarligu samráðingunum millum donksu stjórnina og Føroya landsstýri, fór til verka gjáramorgunin klokkan tíggju. Nevnin er mannað við 21 limum úr ymsu flokkunum á fólkatingi.

Peter Duetoft úr Centrum-Demokratunum, sum er formaður í nevndini, heldur, at nevnin kann tryggja ein samráðingaranda, ið er betur enn tann, vit upplivdu undir fyrsta samráðingarfundinum 17.mars.

Tað var eftir spurnarorðaskiftið á fólkatingi um ríkisrættarligu støðu Føroya, at tað varð samtykt at seta eina fólkatingsnevnd at fylgja samráðingunum. Nevndin skal vera eitt slag av ráðgeva hjá stjórnini bæði áðrenn og eftir samráðingarfundirnar við landsstýrið.

Umframt hetta skal nevndin eisini syrgja fyri, at stjórnin ikki ger nakað undir samráðingunum, sum hon ikki hevur meiriluta fyri í Fólkatinginum.

Teir 21 limirnir, ið manna nevndina eru: Jan Petersen frá Sosialdemokratunum, Pernille Blach Hansen frá Sosialdemokratunum, Dorte Bennedsen frá Sosialdemokratunum, Per Kaalund frá Sosialdemokratunum, Hans-Pavia Rosing, Jens Lunde frá Socialitisk Folkeparti, Aage Frandsen frá Socialistisk Folkeparti, Peter Duetoft frá Centrum-Demokratunum, Elisabeth Arnold frá Radikale Venstre, Jette Gottlieb frá Eindarlistanum, Anders Fogh Rasmussen frá Vinstra, Ulla Tønnes frá Vinstra, Christian Mejdahl frá Vinstra, Pia Larsen frá Vinstra, Bendt Bendtsen frá Koservative Folkeparti, Per Stig Møller frá Konservativ Folkeparti, Pia Kjærsgaard frá Dansk Folkeparti, Peter Skaarup frá Dansk Folkeparti, Jan Sjursen frá Kristelig Folkeparti og at enda Kirsten Jacobsen frá Frihed 2000.




# Málningurin livir

*Tvær føroyskar kvinnur og tríggjar danskar lata í dag upp listaframsýning í Listaskálanum í Havn*

*– Tað hevði ikki latið seg gjørt at havt hesa framsýningina og gjørt hesa skránna uttan góðan stuðul úr bæði Danmark og Føroyum, sigur Aggi*



Málningurin verður í miðdeplinum, tá ein framsýning við fimm listarfólkum letur upp í Listaskálanum í dag.

Talan er um fimm kvinnur – tvær føroyskar og tríggjar danskar – sum allar liva av listini, og vanliga sýna fram í Danmark.

Fýra av teimum sýna fram málningar og tann fimta ger grafisk verk, sum eru trúgv móti tí meira vanliga málninginum.

– Í nógv ár hevur málningurin verið á veg niður, tí listarverkini í dag skulu helst verða onkrar instillatiónir. Men vit vilja gjarna vísa, at málningurin framvegis er á lívi, sigur Aggi, Ásgerð Oskeirsdóttur, sum er ein av teimum fimm, sum sýna fram.

Hinar fýra eru Ingun Hansen, Marianne Tingholm, Anne Marie Pedersen og Gitte Winther

Framsýningin kallast IMAGA, og tað navnið er ein samanseting av forbókstavunum hjá teimum fimm listarkvinnunum.

Í sambandi við framsýningina er ein vøkur og umfatandi skrá prentað.

– Tað hevði ikki latið seg gjørt at havt hesa framsýningina og gjørt hesa skránna uttan góðan stuðul úr bæði Danmark og Føroyum, sigur Aggi.

Framsýningin verður opin til 21. mai.



# Ár at rætta uppaftur

*Skaðin, sum hendur er undir læraraverkfallinum, er so stórur, at tað í ringasta føra kann fara at taka ár at rætta hann uppaftur, sigur formaðurin í Tórshavnar Skúlaráð*

EDVARD JOENSEN

Tað er eingin ivi um, at tað verða næmingarnir í framhaldsdeildunum, sum verða teir stóru tapararnir í trætuni millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið, sigur nýggi formaðurin í Tórshavnar Skúlaráð, Jóhan Samuelsen.

Hann óttast fyri, at tað í ringasta føri kann taka ár at rætta upp aftur tann skaða, sum manglandi undirvísingin í vár hevur gjørt.

Jóhan Samuelsen vísir á, at tað eru fyrst og fremst tey, sum framman undan vóru verri fyri, sum kenna ringasta sviðan. Tað eru tey, sum tíma illa í skúla, sum leggja seg aftur, tá eingin nøktandi skúlagongd er kortini. Tey, sum standa framman fyri eini roynd, og annars eru rímiliga væl fyri bókliga, møta, sigur lærarin og formaðurin í skúlaráðnum, Jóhan Samuelsen.

Serliga ringt verður tað hjá teimum, sum skulu til fráfaringarroynd í framhaldsdeildunum. Tey, sum ganga í 10. flokki, eru kanska ikki ringast fyri. Tey eru tryggjað sum so, sigur Jóhan Samuelsen. Hinvegin er nógv verri statt við teimum, sum ætla sær úr níggjunda flokki á studentaskúla ella handilskúla. Tey skulu hava eitt prógv. Og tað skal helst eisini vera rættiliga gott, fyri at sleppa inn. Her verður galið, tá eitt hol upp á 40 dagar knappliga er í undirvísingini. Har er lætt at detta niðurí.



*Jóhan Samuelsen óttast fyri, at tað í ringasta føri kann taka ár at rætta upp aftur tann skaða, sum manglandi undirvísingin í vár hevur gjørt*

Jóhan Samuelsen hevur onga viðmerking til, hvussu gerast skal við próvtøkurnar, men vísir á, at tey, sum skulu til skrivliga fráfaringarroynd tann 22. mai, eru rættiliga illa fyri. Tað hevur stutt og greitt verið ov lítið undirvíst til, at tey kunna hava neyðuga førleikan.

Formaðurin í Tórshavnar Skúlaráð sigur, at hann er í móti, at Løgtingið leggur upp í og steðgar verkfallinum við lóg. Men hann óttast kortini fyri, at tað verður endin, sum nú sær út.

Tað er eitt samfelt ynski frá øllum foreldrum í landinum, at undirvísingin byrjar aftur beinanvegin, sigur Jóhan Samuelsen. Og hann sigur eisini, at í teimum skúlaráðum kring landið, hann hevur tosað við, er eitt samlað krav, at tað skal setast ein landsstýrismaður at taka sær av skúlamálum í staðin fyri Signar á Brúnni, sum lat málini til eykamannin Høgna Hoydal.

Tað ber yvirhøvur ikki til, at eitt so stórt og týðandi mál, sum øll undirvísingin í fólkaskúlanum, skal vera »bijob« hjá einum landsstýrismanni, sum leggur nógv størri orku í annað mál.

## Plantið eitt træ

*Komandi leygardag ber til hjá havnarborgarum at ogna sær fimm ymisk trø*

Aftur í ár letur Tórshavnar kommuna 500 plantupakkar. Í hvørjum pakka eru 5 ymisk trø av niðanfyrinevndu sløgum, og er ein pakki til hvørt húski.

Plantusløgini eru:
Sitkaelri (Alaskael) Alnus sinuata, harðbalið skjóttvaksandi leyvtræ, verður miðal stórt.

Dúnbjørk (Íslandsk bjørk) Betula pubescens, harðbalið og skjóttvaksandi leyvtræ, verður miðal stórt. Bivøsp, Populus tremula, skjóttvaksandi miðal stórt leyvtræ, villini uppruna-vøkstur fingin úr Hetlandi. Hyll, (Ylliniviður), Sambucus nigra, harðbalin leyvfallandi hávaksin runnur, best í lættari jørð og góðum sólargangi.

Vanlig rønn, Sorbus aucuparia, harðbalið lágvaksið leyvfallandi træ úr Skotlandi, fær reyð ber um heystið

Útflýggingarseðlarnir verða útflýggaðir í býráðssalinum, leygardagin tann 6. mai millum klokkan 14 og 16.

Plantupakkarnir verða sum vanligt heintaðir hjá Skógrøkt Landsins á Hvítanesvegnum, Hoyvík mánadagin tann 8. mai millum klokkan 9 og 18 sigur frílendisdeildin hjá Tórshavnar kommunu.

## Felags sunnudagsskúli í Norðoyggjum

Sunnudagin skipa norðoyingar fyri stórum sunnudagsskúla tiltakið í Kí-høllini, har mangt ymsikt verður á skránni.

Tiltakið er fyriskipa av KFUM & KFUK, sum saman við Heimamissiónini ynskja at markera, at tað eru liðin 2000 ár síðani Jesus bleiv føddur.

Á felagssunnudagsskúlanum, sum er fyri allar Norðoyggjar, verður sjónleikur, felagssangur, sangur frá teimum ið lúttóku á fløguni »Úr staðnum Nasaret«, og so verður eisini ein plakat givin til øll ið koma. Plakatin er teknað út frá evninum, ið verður »eingin er ov lítil til Jesus«.

So ynskir tú at hava tað gott, stuttligt og spennadi saman við øðrum børnunum, vaksnum, ungum og gomlum, so er at fara í KÍ-høllina sunnudagin kl. 15.00 til stóran felagssunnudagsskúla fyri allar Norðoyggjar.



## Harmonikudansur í Leirvík

Stórur harmonikudansur verður í bygdarhúsinum í Leirvík í kvøld.

Á hvítusunnu í fjør hevði harmonikufelagið vitjan ú Reykjavík.

Harmonikufelagið í Føroyum er boðið á vitjan hjá harmonikufelagnum í Reykjavík, og í tí sambandi hevur felagið skipað fyri ymiskum tiltøkum og eitt av teimum er hesin stóri harmonikudansurin í Leirvík.

Bólkarnir, ið vera við, eru: Tetra, Pauli og Óli, Bassarnri, Kallar, 2 radarnir úr Leynum, Harmonikuliðið úr Klaksvík, Spælimenninir úr Nólsoy, Harmonikuliðið av Tvøroyri

Frásøgumenn verða Essa og Árant.

-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL — Sýnaður 04-98 — Skrás.: 02-04-98 — Km.: 24.000 — Prísur: 218.600,- Garanti**
TOYOTA COROLLA 1,3 XLI H/B — Sýnaður 02-00 — Skrás.: 23-08-95 — Km.: 80.000 — Prísur: 93.000,-
TOYOTA CAMRY 2,2 AUT. GEAR — Sýnaður 01-10-99 — Skrás.: 30-05-95 — Km.: 69.000 — Prísur: 158.600,- Garanti*
TOYOTA COROLLA 1,3 G/B — Sýnaður 09-99 — Skrás.: 09-09-91 — Km.: 35.000 — Prísur: 67.000,- Garanti*
TOYOTA CARINA 2,0 GLI — Skrás.: 05-02-98 — Km.: 19.000 — Prísur: 154.600,- Garanti**
TOYOTA COROLLA 1,6 GSI SEDAN — Sýnaður 01-99 — Skrás.: 22-10-91 — Km.: 171.000 — Prísur: 65.600,-
TOYOTA CARINA 1,8 GLI — Skrás.: 05-09-96 — Km.: 32.000 — Prísur: 132.600,- Garanti*
TOYOTA COROLLA 1,3 H/B — Skrás.: 13-06-95 — Km.: 82.000 — Prísur: 93.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA 2,0 GLI — Skrás.: 10-04-97 — Km.: 41.000 — Prísur: 145.600,- Garanti*
FORD ESCORT 1,8 D STW — Skrás.: 26-09-95 — Km.: 64.000 — Prísur: 97.000,- Garanti*
TOYOTA CARINA 1,8 GLI — Skrás.: 10-11-95 — Km.: 90.000 — Prísur: 120.600,- Garanti*
FORD KA — Skrás.: 23-05-97 — Km.: 33.000 — Prísur: 78.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA 1,8 GLI — Sýnaður 12-99 — Skrás.: 28-06-95 — Km.: 70.000 — Prísur: 119.600,- Garanti*
FIAT PUNTO 60 S — Sýnaður 01-97 — Skrás.: 30-01-97 — Km.: 42.000 — Prísur: 79.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA 1,6 — Sýnaður 10-97 — Skrás.: 10-05-95 — Km.: 89.000 — Prísur: 108.600,- Garanti*
MITSUBISHI GALANT — Sýnaður 02-00 — Skrás.: 12-06-91 — Km.: 205.000 — Prísur: 68.600,-
TOYOTA CARINA 1,6 SEDAN — Skrás.: 04-06-93 — Km.: 112.000 — Prísur: 89.600,- Garanti*
VOLVO 460 SEDAN — Sýnaður 06-99 — Skrás.: 25-05-90 — Km.: 88.000 — Prísur: 65.600,-
TOYOTA CAROLLA 1,6 LUNA L/B — Skrás.: 25-01-99 — Km.: 21.000 — Prísur: 136.600,- Garanti**
BMW 318 TDS SEDAN — Skrás.: 01-05-96 — Km.: 65.000 — Prísur: 165.000,- Garanti*

VØRUVOGNAR
TOYOTA LANDCRUISER HJ61 — Skrás.: 31-10-89 — Km.: 137.000 — Prísur: 120.600,- Garanti*
TOYOTA PREVIA 2400 GLI — Sýnaður 03-98 — Skrás.: 27-12-94 — Km.: 58.000 — Prísur: 114.600,- Garanti*
TOYOTA HIACE 4x4 — Sýnaður 07-98 — Skrás.: 19-10-87 — Km.: 165.000 — Prísur: 49.600,-

NISSAN MICRA — Sýnaður 02-00 — Skrás.: 04-10-90 — Km.: 39.000 — Prísur: 30.000,-

AVHEINTINGARTILBOÐ
HONDA ACCORD — Sýnaður 06-99 — Skrás.: 15-08-86 — Km.: 214.000 — Prísur: 12.000,-

* Brúktir bilar yyir 75.000 kr. verða seldir við BRUKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311820